Lagt til rættis: Eyðun Klakstein

Í stuttum



# Konsert í regni

**Tað er ikki bara í Føroyum, at tað regnar, tá stórar konsertir verða hildnar uttandura. Hendan myndin er tikin í Wuhan í Kina, har ungfólk savnaðust til eina konsert. Tað regnaði illa, og tað sæst aftur í teimum litríku regnkæðunum, sum fólk hava latið seg í. Onnur øki í Kina líða framvegis undir drúgva trukinum seinasta summar, sum var tann ringasti í 50 ár. Mynd: Polfoto**



# Playback við Aguilera

Sleppur tú á pallin í Madison Square Garden í New York, ert tú veruliga ein stjørna. Tað er songkvinnan Christina Aguilera eisini, men fjeppararnir vóru misnøgdir eftir konsertina í New York herfyri.

Tað vísti seg nevniliga, at Aguilera als ikki sang, men at bæði tónleikur og sangur var playback.

Aguilera er annars kend fyri at verða ein framúr góður sangari, og umboðsmaður hennara vil bara siga, at tað vóru tekniskir trupulleikar undir konsertini.



# Bamba misti brillurnar

Australia er í hesum døgum vertur fyri HM í svimjing, har eisini føroyskir svimjarar taka lut. Tað er ikki altíð, at tað gongur eftir vild hjá ítróttarfólki til stórar kappingar, og tað noyddist hesin svimjarin úr Sierra Leone at sanna. Gibrilla Bamba var so óheppin at missa brillurnar í kappingini í 50 metra bringusvimjing. Hann endaði aftastur. Mynd: Polfoto



# Bardot á barrikadunum

Hon sæst framvegis av og á millum fólk – franska legendan Brigitte Bardot. Hon hevur í nógv ár verið ein íðin stríðskvinna fyri rættindunum hjá djórum. Farna vikuskiftið var hon við í eini mótmælisgongu til frama fyri djóraverndarfelagsskapir. Boðskapurin hjá Bardot og hinum fólkunum í hesum valtíðum í Fraklandi er: "okkara atkvøða fyri djórini".
Mynd: Polfoto



# Lordi ger ræðufilm

Teir eru nakað heilt fyri seg – monsterpopparnir Lordi úr Finnlandi. Í fjør vunnu teir Eurovision-sangkappingina við sínum trøllarocki, og nú ætlar teir sær eisini á hvíta tjaldið.

Blaðið Dagens Nyheter skrivar, at Lordi skal verða við í einum nýggjum ræðufilmi, sum tað fer at kosta 30 milliónir krónur at gera. Filmurin fær heitið Dark Floors og gongur fyri seg á einum sjúkrahýsi. Forsangarin í bólkinum eigur hugskotið til filmin.

Upptøkurnar byrja í mai mánaði, og bretskir og amerikanskir sjónleikarar skulu spæla við í filminum. (Mynd: Lordi)